## Uppgáva 1




Ein familja var á Mallorka og ferðaðist í summar.

Um borð á flogfarinum keyptu tey:

| | | |
|---|---|---|
| 4 Toblerone | 25 | kr fyri hvørt |
| Belgisk luksuskonfekt | 130 | kr |
| 2 Fossil ur | 495 | kr fyri hvørja |
| Barberspritt | 250 | kr |
| Bodylotion | 160 | kr |
| 2 pakkar av gummibamsum | 20 | kr fyri hvønn |

**a** Hvussu nógv skuldu tey gjalda?

Sama barbersprittið kostar 310 kr í Føroyum.

**b** Hvussu nógv prosent var tað bíligari at keypa barbersprittið í flogfarinum?

Bodylotionið var 20% bíligari í flogfarinum enn í Føroyum.

**c** Hvussu nógv kostar Bodylotionið í Føroyum?

## Uppgáva 2

Tey flugu beinleiðis úr Føroyum til Mallorka.

Teinurin úr Føroyum til Mallorka er 2695 km, og miðalferðin hjá flogfarinum er 770 km/t.

**a** Hvussu langa tíð tók tað at flúgva teinin?




Flogfarið brennur í miðal 2600 litrar av brennievni um tíman.

**b** Hvussu nógvar litrar av brennievni brennur flogfarið úr Føroyum til Mallorka?

Á ferðini úr Føroym millumlendi flogfarið í Glasgow. Ferðin úr Føroyum til Glasgow vardi í 48 minuttir.

**c** Hvussu langt er úr Føroyum til Glasgow?

## *Uppgáva 3*

Á Mallorka brúka tey gjaldoyrað *Evru*. Kursurin á evruni var 743,56.

Tey høvdu Visa-kort við sær á ferðini. Tey kundu veksla í gjaldoyrasjálvtøkum, men kundu bara veksla í mesta lagi fyri 2000 kr um dagin.

**a** Hvussu nógvar evrur kundu tey í mesta lagi fáa um dagin (minsti mynturin í hesum sjálvtøkum er 20 evrur)?

Tá ið tey komu heimaftur, høvdu tey 150 evrur við sær, og tær vekslaðu tey til føroyskar krónur.

**b** Hvussu nógvar krónur fingu tey fyri evrurnar?

## *Uppgáva 4*

Tríggjar linjur $l$, $m$ og $n$ hava hesar forskriftir:

$l$: $y = x - 3$
$m$: $y = -2x + 2$
$n$: $y = 6$

**a** Tekna linjurnar $l$, $m$ og $n$ í somu krossskipan.




Linjan $l$ sker x-ásin í punktinum A.
Linjan $m$ sker x-ásin í punktinum D.
Linjurnar $l$ og $n$ skera hvør aðra í punktinum B.
Linjurnar $m$ og $n$ skera hvør aðra í punktinum C.

**b** Rokna víddina á ferhyrninginum ABCD.

**c** Rokna longdina á linjustykkinum AB.

Ein onnur linja $k$ gongur ígjøgnum $(-6,-1)$ og stendur vinkulrætt á $m$.

**d** Hvør er forskriftin hjá linjuni $k$?